

# Ørur ítróttur

Tað gongur ikki stillisliga fyri seg, tá ið Indian Rural Olympics verða hildnir í Kila Raipur. Kappingarnar eru heldur serstakar, og á myndini sæst ein av kappingunum, har ein av íbúgvunum í býnum skal royna seg undir einum traktori. Maðurin sær bara út til at standa seg heilt væl.

# Teir brúka høvdið




Nei, hesir báðir vinna ikki nakra vakurleikakapping fyri hesa myndina. Tað er ein myndamaður hjá AP, sum hevur fangað ein heldur sermerktan nærdyst millum Frank Lampard hjá Chelsea og Lucas hjá Liverpool. Teir báðir stríðast um bóltin í dys tinum millum feløgini sunnudagin. Tá ið mann sær hesa myndina, so er tað einki undur í, at liðini ikki kláraðu at gera nakað mál í dystinum.

## Leyst og fast um stórt og smátt

Føroyingar hava fingið eitt Brand yviri í Svøríki.

„Lullaby“ og „Goodbye“

Amy kann syngja sum Marylin Monroe: „Diamond´s a girls best friend“

Sangirnir vóru E-type og prototype.

SMS-stemmirnar vóru sum sangstemmirnar.

Møguliga størsti fyrimunurin við Ríkisfelagsskapinum: Vit sleppa ikki at hava okkara egna Grand Prix?

StÍF-leikarnir halda ikki, at dómarin í steypafinaluni BORGAR fyri góðsku .

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Fleyg mest sum tómt**
Í kvøld lendi eitt flogfarð í Vágum við 2 rumenum umborð
www.skalaif.fo

**Tað vil siga, hon brúkar sínar pengar**
Hillary Clinton lænir pengar frá sær sjálvum til sín sjálvs
www.uf.fo

**Fingu ikki orðið fyri seg**
Chelsea og Liverpool málleys
Portalurin

**Aldurin fer við øllum**
- Nú mugu vit minnast til, at tað tekur tíð, frá tí ein hevur tikið avgerð, til ein fær útgerðina upp at standa.
Kristina Háfoss í ÚF

**Tað gjørdi Clinton eisini...**
Nú kemur Al Gore
Sosialurin

**Hvar blivu allir hinir av?**
Árini 1993 til 2001 var hann varaforseti nummar 45 í Clinton-stjórnini í USA
Sosialurin

# Ligg í frið



Tann, sum skrivaði myndatekstin til hesa myndina, ið liggur í myndasavni á Portalinum, hugdi neyvan nóg væl eftir myndini. Jú, víst fekk Tjóðveldi átta tingfólk á løgtingsvalinum fyri viku síðani, men “tey átta tingfólkini” eru tó ikki øll á myndini.